gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# – Hvønn rakar hon næstu ferð?

Ein skelkur fór gjøgnum føroyska samfelagið, tá tað fríggjamorgunin fréttist um ta syndarligu bilvanlukkuna, sum hevði kravt trý mannalív við Skálafjørðin. Allir føroyingar syrgja hesar ungu menn, sum stóðu á gáttini til veruliga lívið og tær avbjóðingar, lívið hevur, og vit øll hava samhugað við teimum, sum hava mist.

Fyri einum góðum ári síðani endaði ein biltúrur hjá trimum ungum suðuroyingum eisini í eini syndarligari vanlukku, og vit skulu ikki leita mong ár aftur, til vit aftur koma fram á slíkar hendingar, sum hava skelkað okkara lítla samfelag. Og hvørja ferð er tað ungdómur í fagrasta blóma, sum verður ryktur hiðani.

Nú kunnu vit spyrja okkum sjálv, hvussu er føroyska samfelagið brynjað at taka ímóti slíkum skakandi hendingum, sum knappliga raka familjur, vinir, býlingar ella bygdir.

– Er kreppuhjálpin til avvarðandi nóg skjót og góð? Um hon ikki er tað, hvussu kunnu vit so brynja okkum betri?

Harafturat mugu vit aftur spyrja, um tær almennu Føroyar gera nóg mikið at forða fyri, at føroyskir ungdómar á nærum hvørjum ári fáa henda meiningsleysa deyða, ella enda sum avlamin í einum koyristóli?

Ráðið fyri ferðslutrygd og skúlin gera eitt stórt og gott arbeiðið, men kundi hetta arbeiðið, at gera fólk tilvitandi um vandan í ferðslu og koyring, verið upp aftur størri?

Um niðurstøðan hjá myndugleikunum er eitt ja, má størri orka leggjast í tað fyribrygjandi arbeiðið!

Eisini er spurningurin, um lóggávan ikki eigur at verða strangari, so vit sleppa undan náttarkoyring við nógvari ferð? Henda er oftast orsøkin til hesar sydarligu vanlukkur. Hetta mál eiga politisku myndugleikarnir at viðgera í størsta álvarsemi, tí mong foreldur hava í hesum døgum ampa og trega av náttarkoyringini.

– Hvønn rakar hon næstuferð?

**Sosialurin**

# Páskasølan hjá Stíggi verður hósdagin

**Verkhúsið Stíggjur í Saltangará hevur árligu páskasøluna hósdagin. Seldir verða lutir, sum arbeiðsfólkið á Stíggi hevur gjørt**

DAGTILHALD
*Edvard Joensen*

**Saltangará:** Verkhúsið Stíggjur á Høgabóli fer at hava útsølu hósdagin 5. apríl frá klokkan 13.oo til 17.oo. Tá fara tey at selja lutir, arbeiðsfólkið hevur gjørt nú í vár.

Tey sita so hugagóð og mála ella draga perlur upp á tráð. Onkur av starvsfólkunum er hjá teimum og roynir at leggja lag á, tá ikki alt gongur eftir vild.

Men lagið er gott. Onkur syngur, meðan onnur eru eitt sindur forvitin at frætta, hvør hesin nú er, sum er komin við myndatólinum inn á gólvið. Onkur er sum veit, at hetta er blaðmaður á Sosialinum, og so fái eg heilsu við til onkran starvsfelaga, sum tey hava hitt fyrr.

Úti á snikkaraverkstaðnum eru teir í gongd við at smíða sengur. Dukkusengur eru tað, teir gera. Onkur situr og málar, áðrenn tær vera settar saman. Endar og síður eru sagað til.

Yviri í einum króki stendur Kristian og leggur seinastu hond á samansettu sengurnar. Hann borar smá hol niður í stólparnar fyri tøppunum, sum skulu prýða hesar fittu dukkusengurnar.

Tá hann er liðugur, verða tær stáplaðar hvør oman á aðra, og hann stendur sera fegin og skoðar úrslitið.

Vit fara innaftur, har Poulina Johannesen, leiðari á Stíggi, greiðir frá, at tað, sum nú verður selt, alt frá páskaharum og eggum yvir silkimáling til hillar og dukkusengur. Eisini verður kaffi, te og saft við onkrum afturvið at fáa hendan dagin.

Annars er altíð opið, tá fólk eru til arbeiðis á Stíggi. So tann, sum hug hevur, kann altíð støkka inn á gólvið at vita, um okkurt forkunnugt er til sølu í handlinum.

Tey eru umleið 20 arbeiðsfólk á Stíggi dagliga. Tey koma úr allari Eysturoynni at kalla, hóast fleiri búgva á bústovni í Runavík.

Vanligt er eisini, at tey gera onkrar útferðir um summarið. Og í ár verður tað eftir ætlan ikki bara nøkur hissini ferð soleiðis. Nei, nú fara nøkur teirra ein túr til Cypern at ferðast saman við starvsfólki á stovninum.



*Kristian stendur so hugagóður og skoðar verkið*
*Mynd: Edvard Joensen*


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult cyan magenta svart






petur & petur • 320870